## Sosialistisk Ungmannafelag endurstovnað

Nøkur ung javnaðarfólk hava tikið stig til at endurstovna Sosialistiskt Ungmannafelag - SU, sum upprunaliga varð stovnað í 1965. Á heimasíðuni hjá Javnaðarflokkinum verður boðað frá, at lív aftur er komið í SU, sum felagið vanliga varð kallað. Tað eru nøkur ung, sum hava tikið seg saman at endurstovnað ungmannafelagið hjá Javnaðarflokkinum. Nøkur teirra fara til Esbjerg á eitt páskaskeið sum DSU (Danmarks Socialdemokratisk Ungdom) skipar fyri.



## Kannast umaftur

Ein meiriluti í danska Fólkatinginum umhugsa at seta eina nevnd at kanna eldsbrunan umborð á ferjuni ”Scandinavian Star” fyri 20 árum síðani. Vanlukkan kostaði 159 mannalív. Danski Fólkaflokkurin, Sosialistiski Fólkaflokkurin og Eindarlistin taka undir við at seta ein nevnd at kanna vanlukkuna, men Sosialdemokratarnir og Tey Radikalu hava ikki tikið støðu enn. Málið kemur til viðgerðar í Fólkatinginum tann 15. apríl, tá eitt spurnarorðaskifti verður um tað. Lars Barfoed, løgmálaráðharri, er ímóti at seta kanningarnevndina.

# Yvirgangsbumbur í Moskva



**Minst 38 fólk doyðu, tá tvær kvinnur sprongdu seg í luftina í undirgrundarbreytini í Moskva tíðliga í morgun**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Klokkan á Lubyanka-støðini í undirgrundarbreytini í Moskva var 06.56 í morgun, og fólk í túsundatali runnu ímillum tokini, tí tey skuldu til arbeiðis. Brádliga var ein ógvusligur brestur, og alt var í einum ruðuleika. Fleiri róptu, onnur skríggjaðu, og tey flestu tóku til beins fyri at sleppa burtur.

45 minuttir seinni endurtók søgan seg á undirgrundarstøðini Park Kulturij, sum er tætt við Moskva-ánna miðskeiðis í høvuðsstaðnum.

Russisku myndugleikarnir staðfestu skjótt, at talan var um tvær bumbuspreingingar, og at høvdu kravt 38 mannalív. Sostatt var greitt, at talan var um yvirgang, og seinni segði borgarstjórin í Moskva, at tað vóru tvær kvinnur, sum høvdu sprongt seg í luftina við bumbunum.

– Eftir teimum upplýsingum, sum vit hava nú, høvdu kvinnurnar bundið spreingievnið um miðjuna á sær, segði Jurij Sjomin, sum er leiðari fyri ákæruvaldinum í Moskva, við tíðindastovuna Interfax. Ein russisk tíðindastova segði, at onnur kvinnan hevði havt tvey bumbubelti um miðjuna, men at bara annað brast.

Russisku tíðindastovurnar skrivaðu fyrrapartin, at myndugleikarnir bóru ótta fyri fleiri atsóknum, og at loftferðslumyndugleikarnir høvdu hert eftirlitið í øllum floghavnunum.

**Úr Kaukasus**

Fyrrapartin hevði eingin átikið sær ábyrgdina av atsóknini í Moskva, men russisku tíðindastovurnar skrivaðu, at myndugleikarnir høvdu illgruna til islsmakaruppreistrarbólkar, sum eru virknir í teimum ófriðarligu økjunum í norðara parti av Kaukasus.

Russiski forsetin, Dmitri Medvedev, segði fyrrapartin, at russisku myndugleikarnir fara ongantíð at steðga bardaganum ímóti yvirgangi, og at tilburðurin í morgun skal kannast til botns.

Atsóknin í morgun er tann fyrsta í Moskva síðani august í 2006. Tá sprongdi ein sjálvmorðsbumbumaður seg í luftina uttan fyri eina undirgrundarstøð og tók níggju fólk við sær í deyðan. Ta ferðina váttaðu uppreistrarmenn í Kekenia, at teir høvdu sent bumbumannin til Moskva.

# Ísland skal hava færri ráðharrar og minni umsiting

**Eftir ætlanini skal íslendska stjórnin hava níggju limir ella tað sama sum okkara landsstýri**

ÍSLAND
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Tað var á landsfundi hjá Samfylkingini um vikuskiftið, at floksformaðurin, Jóhanna Sigurðardóttir, forsætisráðharri, boðaði frá hugskotinum um eina umfatandi broyting í teirri almennu umsitingini.

Íslendska stjórnin hevur í løtuni tólv ráðharrar, men ætlanin hjá forsætisráðharranum er at leggja nøkur aðalráð saman, soleiðis at ráðharratalið fer úr tólv niður í níggju, og tað skal gerast longu í ár, sigur hon.

Jóhanna Sigurðardóttir boðaði eisini frá umfatandi rationaliseringum, sum skulu skerja útreiðslurnar til ta almennu umsitingini. Hon nevndi, at í løtuni eru umleið 200 almennir stovnar av ymsum slagi, men at eftir ætlanini verður talið 120 um tvey ella trý ár. Í hesum tíðarskeiði fer stjórnin at endurskoða virksemið og uppgávurnar hjá stovnunum og at leggja summar teirra saman.

Sambært forsætisráðharranum er talæan um størstu broytingina í ríkisumsitingini nakrantíð.




*Jóhanna Sigurðardóttir: – Íslendska stjórnin skal hava færri ráðharrar, og stovnar skulu leggjast saman*

*Mynd: Vísir*

PÁSKASTEVNAN
FRÍKIRKJAN OASAN - 2010

**Skírishósdagur 1. apríl**
Kl. 19.00 Kvøldmøti við Stephan og Anne Christiansen
Sangur: Sigrið, Annika og genturnar

**Langi fríggjadagur 2. apríl**
Kl. 10.00 Morgunmøti við Símun Jacobsen
Sangur: Jónfríð og Marianna
Kl. 19.00 Kvøldmøti við Stephan og Anne Christiansen
Sangur: Sharon Zachariassen
Kl. 22.30 Ungdómstiltak við Stephan og Anne Christiansen
Ungdómskórið í Oasuni syngur
Tá ungdómstiltakið er liðugt, verður Café-kvøld í kjallaranum

**Páskaaftan 3. apríl**
Kl. 19.00 Kvøldmøti við Stephan og Anne Christiansen
Sangur: Zamar (úr Kelduni)
Kl. 22.00 Lovsangskvøld

**Páskadagur 4. apríl**
Kl. 10.00 Morgunmøti við Paula Høj
Sangur: Tórfríð Tausen
Kl. 15.00 Familjumøti
Barnakórið syngur
Kl. 19.00 Kvøldmøti við Stephan og Anne Christiansen
Sangur: Quinto

**2. Páskadagur 5. apríl**
Kl. 10.00 Morgunmøti við Heðin Lamhauge
Sangur: Oasubrøðurnir
Kl. 18.00 Kvøldmøti við Jóhan Petur Johannesen
Sangur: Páll & Judith